## Nýtslan í USA veksur

Tað kom heldur óvart á eygleiðarar, tá amerikanska stjórnin í gjár kunngjørdi, at sambært hagtølunum vaks tann privata nýtslan í USA í januar, og at inntøkurnar eisini hækkaðu eitt vet. Hagstovan í Washington sigur, at tann privata nýtslan vals 0,6 prosent í januar, og hetta er største vøksturin síðani mei í fjør. Hetta er ein stór broyting samanborið við desember, tí tá minkaði privata nýtslan eitt prosent. Inntøkuvøksturin í januar var 0,4 prosent, og tað er eisini tað mesta síðani mei í 2008, sigur handilsmálaráðið í Washington.



## Neyvan nøkur lodna

Tey, sum eiga íslendsku nótaskipini, hava næstan mist allar vónir um, at skipini sleppa á lodnuveiði í ár. Tær seinastu vikurnar hava bæði havrannsóknarskip og nótaskip leitað eftir lodnu víða í íslendskum sjógvi. Eina tíð var so mikið at síggja, at nøkur fá skip fingu nakrar túrar, men síðani hevur verið steinoyðið aftur. Leitingarskipini hava serliga leitað á Suður- og Suðureysturlandinum, men teir seinastu dagarnar hava skipini leitað á Vesturlandinum og Vestfirðum. Í gjár varð sagt, at verður finna skipini ikki lodnu í hesari vikuni, gevast tey.

# Breyt seg úr logandi bili

**Um klokkan hálvgum trý seinnapartin í gjár, kom eldur í ein bil, sum var farin útav vegnum við Bjargir, norðanfyri Langasand. Hóast bilurin koyrdi seint og var um 1 ár, kom eldur í av stoytinum**

112

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Um klokkan hálvgum trý í gjár, kom ein fráboðan til alarmsentralin um ein bil, ið var farin útav vegnum norðanfyri Langasand, og at eldur var komin í bilin.

Ein maður førdi bilin, og var einsamallur í honum tá óhappið hendi. Hann kom koyrandi suðureftir Víkarvegnum, og koyrir við Bjargir, norðanfyri Langasand, tá hann er óskettin meðan hann skimast niðan í bøin, har hann sær onkran geva seyðinum, og koyrir útav høgrumegin, og niður í eina veit.

Maðurin, ið koyrdi bilin, greiddi fyri løgregluni frá, at hann, nú tá hann hugsaði nærri um tað, í okkurt um eina viku frammanundan hevði hómað onkran løgnan lukt úr instrumentbrettinum, men at hann tá ikki hevur lagt meira í tað.

Tá bilurin fer útav vegnum, koyrir hann niður í eina veit, og eldur kemur í bilin. Men í tí at bilurin er farin niður í eina veit, er bilurin skoraður fastur, og dyrnar fáast ikki, so tann vegin sleppur hann ikki út.

At enda eydnast tað honum at bróta seg út gjøgnum síðurútin á førarasíðuni.

### Verður kannaður

Bilurin, sum maðurin koyrdi við, var av slagnum SsangYong Actyon, knapt 1 ára gamal. Vegurin, har maðurin koyrdi er einsporaður, og ferðin var lítil tá, óhappið hendi. Tískil kann tað tykjast sera løgið, at eldur skal koma í bilin, tá hann er somikið nýggjur, og ferðin somikið lág, umframt at eingin serligur materiellur skaði hendi í upprunaliga stoytinum.

Løgreglan greiðir frá, at ein av orsøkunum kann vera, at bilarnir eru blivnir alt meira tekniskir, og har kann saktans okkurt vera fest í.

Bilurin er nú koyrdur á Akstovuna, har hann verður kannaður nærri.





*Sum tað sæst á myndunum, er bilurin sera illa brendur. Næstan bara reint metal er eftir, og mestsum alt annað er brent av bilinum*

*Myndir: Jens Kristian Vang*

# Atlantic Petroleum í fríum falli

**Virðið á partabrøvum í Atlantic Petroleum fellur skjótari enn steinur av himli omaná vánaliga úrslitið, ið varð kunngjørt fríggjamorgunin. Virðið er fallið 32 prosent síðan tá**

OLJUVINNA

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tað gongur av skriðuni hjá føroyska olju- og gassfelagnum Atlantic Petroleum.

Olju- og gassfelagið Atlantic Petroleum kundi í 2008 fyri fyrstu ferð vísa á vinning av sølu. Tær 43,3 milliónirnar, teir fingu inn fyri sølu, vóru tó langt frá nokk til at fáa botnlinjuna hjá felagnum at fara á pluss, og tilsamans kundi felagið vísa á eitt undirskot áðrenn skatt á 145,4 milliónir krónur, ið næstan er tvífalt so stórt sum árið fyri, tá talan var um eitt undirskot á 76,1 milliónir krónur fyri skatt.

Tá Atlantic Petroleum kunngjørdi ársroknskapin, vísti tað seg eisini at væl varð skarvað av eginpeninginum, sum fall frá 227,2 milliónum niður í 166,8 milliónir krónur. Samstundis vaks skuldin úr 68,7 milliónum krónum upp til 357,4 milliónir krónur.

Hesi vána úrslit verða sjálvsagt eisini revsaði á virðisbrævamarknaðinum. Síðan fríggjamorgunin, tá úrslitið varð kunngjørt, er virðið á partabrøvum í Atlantic Petroleum farið 32 prosent eftir reyv, og tá er fallið bert góð trý prosent í dag.

Fyri árið 2009 væntar felagið eitt rakstrarúrslit á 20 til 25 milliónir krónur áðrenn frádráttir av miseydnaðum royndarboringum.

Virðið á partabrævinum er í skrivandi stund 272 krónur, ið er næstan ein tíggjundapart av tí, partabrævið kostaði, tá tað kostaði mest í november 2007, tá tað kostaði 2415 krónur fyri partabrævið




*Botnlinjan hjá Atlantic Petroleum gjørdist gloðandi reyð, og tað verður revsað á virðisbrævamarknaðinum. Virðið er minkað við 32 prosentum síðani ársroknskapurin var kunngjørdur*

*Savnsmynd*